út at koyra

Japanarar minst brek

Ein t‡sk ADAC kanning av bilum millum 4 og 6 ár vísti, at d‡rir bilar vi› nógvari elektroniskari útger› ofta hava fleiri brek. Eisini at japanskir bilar vi› Toyota á odda høvdu minst brek.

Kelda: Motor Magasinet

N‡ggjur Renault Trafic

Á vørubilaframs‡ningini í Frankfurt nú í september ver›ur ein Renault konseptbilur s‡ndur fram, i› skal avloysa núverandi Trafic í 2001.

Kelda: Volvo Personvogne Danmark A/S

Mitsubishi n‡tt design-programm

Framkomna designprogrammi› hjá Mitsubishi ger ta› møguligt, at upp til 1500 designarar og verkfrø›ingar kunnu arbei›a vi› einum bilmodelli, samstundis um tey sita í Japan, USA ella Australien.

Kelda: Bilen Motor & Sport

Aftur ein Astra – nú sum cabriolet

MAGNUS GUNNARSSON

Ta› er næstan ikki endi á hvussu, nógvum útgávum Opel Astra fæst í. Á bilaframs‡ningini í Paris í oktober ver›ur ein Astra cabriolet at síggja. Bertone designarafyritøkan hevur tekna› bilin og sta›i› fyri cabriolet teknikkinum, har stofftaki› ver›ur goymt undir einum dúki í sama liti sum bilurin.

Kelda: FDM / Motor

Audi A4 Coupé í tveimum útgávum

MAGNUS GUNNARSSON

Saman vi› menningini av n‡ggja Audi A4 ver›ur arbeitt vi› tveimum coupé útgávum, har anna› modelli› ver›ur uttan mittarstólpa millum hur›arnar. Fleiri bilverksmi›jur arbei›a vi› bilum uttan mittarstólpa, eitt nú Citroën C3 og ein Mazda Wankel sportsvognur. Ta› at stólpin manglar, hevur volt til trupulleikar á teimum lógarkravdu stoyttestunum inn á sí›una, men ta› letur til, at teir eru vi› at finna eina loysn, sum heldur. Ta › er munandi lættari, tá man skal inn ella út úr einum coupé, at ongin mittarstólpi er. Væntandi koma A4 Coupé modellini á markna›in í 2002, og seinni kemur ein cabriolet útgáva.

Kelda FDM / Motor



út at koyra

Volvo V70 – ein luksus stationvognur

MAGNUS GUNNARSSON

Í februar høvdu vit eina grein um Volvo V70, i› skuldi koma á markna›in í mars mána›a. Nú er bilurin komin higar til lands, og hann tekur seg væl út.

Rúmligir stationvognar

Volvo stationvognarnir hava altí› veri› rúmligir, brúkaravinarligir og nógv brúktir av fólki vi› egnum virki ella sum arbei›sbilar hjá fyritøkum. Ey›kenni fyri hesar stóru stationvognar er, at rúmi› innan, frá baksetrinum til baklúkuna, er stórt og arbei›sligt. Hetta hevur veri› galdandi líka frá Volvo PV til 144 og 240 seriuna.

Gjøgnumførdur og rúmligur

Volvo V70 er ein luksusbilur burturav, og føraraplássi› er so gjøgnumført, sum man kann hugsa sær. Ta› er ikki ney›ugt at siga, at ein bilur í hesi støddini eisini er rúmligur innan og gott pláss er til beinini. Hóast V70 er bygdur yvir sama plattform sum Volvo S80, er hann ein 11 cm stytri bilur, i› ikki er bygdur yvir ein persónvogn, men er ein n‡ggjur stationvognur.

Tryggur sum ein Volvo

Hjá Volvo er trygd ikki ta› sama sum at bilurin hevur so nógvar ymiskar trygdarskipanir sum møguligt. Ísta›in er ta› heildin, sum telur - at trygdin er grundleggjandi innbygd í bilin. Vil man hava mest møguliga verju í bilin, skal tann aktiva og passiva trygdin arbei›a saman. V70 hevur eitt nú aktivar WHIPS nakkapútur og IC (Inflatable Curtin), sum verjir høvdi› vi› ein sí›usamanstoyt.

Pakkar vi› eykaútger›

Volvo hava fleiri eykaútger›spakkar at velja ímillum. Hesin, vit royndarkoyrdu, hevur hevur t.d. STC antispinn, automatiskt klimaanlegg, informatiónssentur, fartpilot, tokulyktir, le›ursetur, le›urrætt, træpanelir og 16” felgur. Eisini kann bilurin leverast vi› setrum í vi›førisrúminum, i› venda aftureftir, har pláss er til tvey børn. Tá setrini ikki eru í brúk, kunnu tey leggjast undir vi›førirúmi›. V70 fæst einans vi› fimm syl. bensin og dieselmotorum. Hesin er ein 2,4 litur vi› 5 syl. bensinmotori, 170 hk og automat gear.

Volvo V70

Motorurin	2.4 litur 5 syl 170 hk
0-100 km/t	9,0 sek.
Bensinn‡tsla	11,3 km/l
Dekkstødd	215/55-16
Stødd og vekt	
Longd	471,0 cm
Breidd	180,4 cm
Hædd	148,8 cm
Eginvekt	1528 kg
Totalvekt	2150 kg
Prísur	kr. 442.800,-
Søluumbo›	P/F Brø›ur Petersen Bilar Hoyvíksvegur 61 FO-110 Tórshavn Tlf. 314360